


*Nr. 9* *19. apríl 2020* *80. árg.*

# Hin endurloysandi tímin

Hjá Matteusi kapittul 26,40-41 lesa vit: „Hann kemur til lærusveinarnar og hittir teir sovandi, og hann sigur við Pætur: „So vóru tit ikki mentir at vaka ein tíma við mær! Vakið og biðið, at tit ikki mega falla í freisting! Andin er fúsur, men holdið er veikt.“

Ein tími í bøn endurloysir alt, og tí ger djevulin alt, hann kann, at forða okkara bønalívi. Tí kunnu tú og eg spyrja okkum sjálv, tá ið vit falla í synd ella í aðrar freistingar og vera fyri ósigri: „Havi eg brúkt nóg nógva tíð í bøn? Havi eg verið saman við Harranum í meir enn ein tíma?“ Um svarið er nei, so veitst tú eisini, hví tað stendur til við tær, sum tað ger. So einfalt er tað.

Í Ják. 4,2 stendur: „Tit hava ikki, av tí at tit biðja ikki.“ Í Áps. 6,4 stendur: „Men vit vilja halda trúliga á í bønini og í tænastu orðsins.“ Lærusveinarnir valdu ikki at tæna við borðini, so at teir kundu halda á í bønatænastuni og orðsins tænastu. Gev tær far um, hvat ið kemur fyrst, tað er bønin, tínæst orðið. Heilt einfalt av tí at um vit skulu fáa eina opinbering í skriftunum, mugu vit dvølja í bøn, so at vit biðja samsvarandi Guds orði. At biðja ein tíma ella meir krevur venjing og lýdni.

Her hjá okkum er bønalívið fyri tað mesta á barnagarðsstøði. Fólk biðja minst møguligt, og tey minst vitjaðu møtini eru bønamøtini, sum eru tey týdningarmestu í einari meinigheit. Tá ið eg vitji onnur lond sum Moldova, er bønin altíð í miðdeplinum. Øll biðja í munnin hvør á øðrum út frá teimum evnunum, sum biðið verður fyri. Her hjá okkum eru mong kristin bangin at biðja hart. Hví? Tí djevulin er lívræddur fyri

okkum, at vit skulu bróta ljóðmúrin, tí hann veit, at vit hava eitt undurverk í munni okkara.

Jødar brúka „daven“, tá ið teir biðja. Teir biðja við øllum kroppinum, teir rugga fram og aftur, og kroppurin er alla tíðina í rørslu. Tað ger, at teir hugsa og miðsavna seg um bønina og skriftlesing. Tað sært tú, um tú fert yvir til grátimúrin. Tað er øðrvísi við okkum, vit sita, falla á knæ ella standa still við boygdum høvdi og samanløgdum hondum og biðja fyri tað mesta stillar bønir. Hetta ger, at vit ofta fáa ikki miðsavna okkum, og tankarnir flákra allastaðni. Og tá ið vit sita við boygdum høvdi og blunda, kunnu vit sovna. Tí stendur, at vit skulu lyfta upp heilagar hendur: „Eg vil tá, at menninir skulu halda bøn soleiðis, at teir á einum og hvørjum staði lyfta upp heilagum hondum uttan vreiði og trætnað.“ 1. Tim. 2,8.

Djevulin hevur forpurrað veking og skapað tvídrátt. Guds verk er syndrað, meinigheitir eru tiknar av. Familjur eru sorlaðar, og fólk eru fráfallin. Svarið er altíð hitt sama: manglandi forbøn og bøn. Sera fá kristin skilja andabardagan, sum fer fram í dagsins samfelagi, har djevulin er stigin niður til okkara í stórari vreiði, tí hann veit, at tíðin, hann hevur, er so stutt. Opb. 12,12.

Jesus segði og áminti okkum í Luk. 18,1: „Hann talaði eitt líknilsi til teirra um tað, at teir áttu altíð at biðja og ikki troyttast.“

*Effie Campbell* umsetti.

# Tríggir leskiligir rættir

Í 1. Kor. 1,30 lesa vit: „Tit eru í Kristi Jesusi, sum er vorðin okkum vísdómur frá Gudi og rættvísi og halgan og endurloysing.“

Bíblian sigur, at frelsan heilt og fult er Hansara verk. Vit hava einki við hetta at gera. Vit kunnu bara taka ímóti tí, Gud hevur gjørt liðugt til okkara. Tað einasta, vit kunnu reypa okkum av, er, at vit eru í Honum. Tað er so gott, at Bíblian tosar so greitt um hetta, at frelsan bert er Guds verk. Jesus hevur gjørt alt liðugt. Hetta er, sum at seta seg til eitt flott borð, har borðreitt er við trimum leskiligum rættum. „Mær borð tú reiðir.“ Sálm. 23,5.

Fyrsti rætturin kallast rættvísi. Bíblian sigur, at Jesus er okkara rættvísi. Á norskum eitur tað „rettferdighet“. Aril Edvardsen plagdi at siga tað soleiðis: „Rett er rett, ferdig er

ferdig, og gjort er gjort. Rettferdiggjort." Jesus gekk í okkara stað, Hann skifti um við okkum og tók okkara synd upp á seg. Vit hava fingið fyrigeving út í æsir. Vit kunnu ikki vaksa í rættvísi, um vit liva 100 ár afturat, verða vit ikki meir rættvís, enn vit eru í dag.

Næsti rætturin eitur heilaggering ella halgan. Hon er um okkara lív saman við Gudi. Har kunnu vit vaksa dag frá degi í eyðmýkt og gerast meira búgvin. Heilaggering er ein framhaldandi tilgongd. Tað er altíð rúm fyri vøkstri. Hetta kunnu vit heldur ikki rósa okkum av. Vit kunnu hvíla í Honum, sum skal vinna skap í okkum. Kristus í mær er mín heilaggering. Hann rúmar alt, mær er tørvur á: gleði, friður, kærleiki, styrki og lekidóm. „Tí at í honum líkaði tað Gudi, at øll fyllingin skuldi búgva." Kol. 1,19.

Triði rætturin eitur endurloysing. Tá ið allir verkirnir koma yvir jørðina, verða tey frelstu, tey, sum hava bjóðað Jesusi inn í hjarta sítt, endurloyst: „Tað skulu verða tekin í sól og mána og stjørnum, og á foldini munnu tjóðflokkar kvíða í ráðloysi, tí at hav og sjógvar bróta, meðan menn ørmaktast av ótta og stúran fyri tí, ið koma skal yvir jarðarríkið; tí at skakast skulu himmalsins kreftir. Og tá skulu tey síggja menniskjusonin koma í ský við mátti og miklari dýrd. Men tá ið hetta fer at henda, tá lítið upp og hevjið upp høvdum tykkara, av tí at loysn tykkara nærkast." Luk. 21,25-28.

Tað er av Jesu ávum, at eg komi til himmals ein dag. Endurloysnin er bara Hansara verk. Vissan og trygdin fyri, at eg komi við heim til himmals ein dag, er, at Jesus er mín endurloysing. Hann fær æruna at enda, og Hann er mín trygd fyri ævinleikan.

*Andreas Hasseløy – Effie Campbell* ums.

# Slepp beiskleikanum – og verð fríur!

*Av Solveig Pedersen*

*„Og gevið gætur, ...... at eingin beiskleikarót rennur upp, sum ger óskil, og mangir verða smittaðir av henni." Hebr. 12,15.*

Flest øll fólk hava okkurt, sum tey vita, at tey eiga at fyrigeva. Men grundirnar til, at tey ikki gera tað, eru mangar. Summi vilja ikki fyrigeva, av tí at mótparturin ikki vil viðganga síni misbrot. Tey halda, at um tey bera hesar trupulleikarnar,

verður tað ein máti at revsa mótpartin. Tey kenna tað soleiðis, at um tey halda fast um beiskleikan, er kanska møguleiki fyri at loysa málið. Tað, sum tey ikki síggja, er, at tey, sum verða revsað, eru tey sjálv. Uttan mun til, hvør ið orsøkin er, so loysir tað seg ongantíð at vera beiskur og hatskur.

Eg síggi ein mann fyri mær. Hann gongur eftir einum landavegi og ber eitt kuffert. Fólkini á vegnum eru illviljað og áleypandi. Tey kasta steinar og ymiskt burturkast eftir honum. Hvørja ferð, tað hendir, hentar hann tað upp og leggur tað í kuffertið. Hann stríðir seg víðari við hesum kuffertinum, sum tyngist í hvørjum. Onkur spyr, hví hann tekur hetta við sær, og hann svarar, at hann ætlar sær at brúka tað sum prógv um, hvat ið tey hava gjørt móti sær. So við og við gerst viðførið so tungt, at tað er ikki meir enn hann knógvar undir tí, og illa gongst at sjabba víðari. At enda gevst hann og setir seg við vegjaðaran. Annaðhvørt kann hann verða sitandi har ella sleppa sær av við steinarnar og burturkastið. Um hann velur hitt fyrra, fer tað at forða honum at koma víðari. Stinkandi burturkastið fer at súrga tilveruna, og fullkomin stígur er komin í. Tann einasta, hann revsar, er seg sjálvan. Tey, sum gjørdu honum ónt, flenna at honum og halda á sum fyrr. Um hann velur at sleppa sær av við hetta eyka viðførið og fyrigeva hesum fólkum, er hann fríur og frælsur.

Júst soleiðis er tað við beiskleikanum. Halda vit fast um hann, fer hann at oyðileggja okkara sinni og alla tilveru okkara. Vit kunnu eisini eitra menniskjuni kring okkum. Hetta er serliga galdandi fyri heimalívið. Børn, sum vaksa upp við foreldrum, sum eru beisk, læra at krøkja seg upp í trupulleikarnar, upp í tað vonda.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Ein gomul kona segði: „Eingin her má eta, fyrr enn vit hava takkað Gudi fyri matin og vælsignað hann.“

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | |
|---|---|---|
| 19. apríl | Tekstur: Jónas 1-4 | bíbliuorð: Jón. 2,10b |
| 26. apríl | Tekstur: 1. Kong. 17, 1-16 | bíbliuorð: Luk. 1,37 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




***Nr. 10*** ***3. mai 2020*** ***80. árg.***

# Viktor Klimenko

Viktor Klimenko varð borin í heim í 1942 í Karelia. Pápi hansara var ein kosakkur úr Ukreina, og mamman var russisk. Nøkur fá ár eftir, at hann varð føddur, flutti familjan til Finnlands. Hann gjørdist tónleikari og spældi við í fleiri filmum. Hann gjørdist heimskendur sum sangari. Men í 1980 bleiv hann gospelsangari, eftir at hann varð umvendur. Hann var gestur hjá Randi Fildtved Johansen á Visjon Norge, har hann greiddi frá lívi sínum.

„Eg fór at fáast við yoga og kom so langt inn í tað, at eg kundi smúgva mær úr kroppinum. Tað var løgið. Eg sá og hoyrdi alt, hóast eg var leysur frá kroppinum, sum lá á gólvinum og eisini hevði eygu og oyru, og so kundi eg smúgva mær inn aftur í kroppin, sum í grundini bara er eitt hylki, eitt skal, har andin býr í. Jú longur eg kom inn í yoga, jú longur sakk eg niður í eitt djúpt, djúpt myrkur. Sovorðið eru andsmaktir, og tað er sera vandamikið og ikki at spæla við.

Men so bleiv eg frelstur og slapp burtur úr øllum hasum, og síðani havi eg arbeitt fyri Harran, sungið og vitnað. Emanuel Minos gjørdist mín andaligi faðir. Um eg skal siga, hvat ið eg haldi um tað andaliga lívið í dag, so má eg mangan øtast við. Blinkandi ljós og harður tónleikur, tað er sum í einum diskoteki. Prædikan er ofta um, at vit skulu hava fíggjarliga framgongd og fáa alt, ið vit biðja um. Gud kann geva okkum alt, og um hann sær, at tað er gott fyri okkum, so mettar hann sanniliga okkara tørv, grøðir og ger undur. Men eg haldi, at vit alt ov sjáldan hoyra um, at Jesus segði, at vit skulu taka krossin upp og fylgja honum. „Tann, ið ikki tekur kross sín og fylgir mær eftir, er mær

ikki verdur. Tann, ið bjargar lívi sínum, skal missa tað; og tann, ið missir lív sítt fyri mínar sakir, skal bjarga tí.“ Matt. 10,38-39. Og víðari: „Vil nakar ganga aftan á meg, tá avnokti hann sjálvan seg og taki upp kross sín og fylgi mær!“ Matt. 16,24. Hetta eru jú púra øðrvísi tónar og sera álvarslig orð.

Tá ið eg var í Amerika, tosaði eg við David Wilkerson. Hann hevur skrivað ein profeti um dómin, sum í endatíðini kemur yvir Skandinavia. Har henda so ræðulig ting, so vit skakast í botn og grund. Tá ið Emanuel Minos hevði lisið henda profetiin, segði hann: „Eg trúgvi hvørjum orði. Hasin profetiurin er sannur. Og skal eg siga tær, hví eg sigi so? Eg havi sjálvur fingið sama profetiin, men hetta var alt so ógvisligt, at eg tordi ikki at siga hann fram.“ Men um vit lesa í Bíbliuni, so verður har sagt frá, hvussu ógvisligt tað verður í Harmageddon-krígnum. (Opb. 16,16). Tað skuldi ikki komið óvart á tann trúfasta bíbliulesaran.

Latið okkum vera vakin, lesa Guds orð og biðja, so vit hava eyka olju á lampuni, tá ið Jesus kemur aftur.

*Effie Campbell.*

# Verið áhaldandi í bønini

Tað var eitt kvøldið, at vit komu av møtinum í Meinigheitshúsinum og komu í fylgi við einum manni. Tá fer hann at greiða frá einari hending, sum hann fyri nógvum árum síðani, hevði upplivað.

Hann hevði í eitt langt tíðarskeið pínst illa av tveimum prolapsum, sum hann hevði í rygginum. Hann hevði verið mangar, mangar ferðir frammi til forbøn, og tað nyttaði einki. Tað var blivið líka sum ein vani, og hann væntaði sær heldur einki.

So eitt kvøldið er hann aftur á einum karismatiskum møti. Tað eru tríggir menn, sum standa fyri hesum møti. Eftir taluna bjóðar Thomas Juul fram til forbøn. Tá rópar hesin maðurin: „Tú, hvussu ofta skal ein koma til forbøn, áðrenn ein fær svar?“

Thomas Juul vendir sær til Per Waag og spyr hann: „Hvat svarar tú hasum manninum?“ Per vendir sær til tann triðja mannin, sum kallaðist Mr. Smith og var úr Esbjerg, og spyr hann. Smith rópar mannin fram og sigur við hann: „Hvussu kennir tú tað beint nú inni her?“ Og so bankar hann á bringuna á sær sjálvum.

„Eg kenni meg sum einkjuna í Luk. 18, sum Jesus greiddi frá. Hon bleiv við at koma á dyrnar hjá dómaranum, men hann vildi ikki svara henni. Hon gavst ikki, men herjaði alsamt á. Tá troyttaðist dómarin av henni og gav henni tað, sum hon bað um.“

„Júst so, tað er tað, sum tú skalt gera,“ svaraði Mr. Smith. So legði hann hendurnar á mannin og bað eina bøn fyri honum, og maðurin varð frískur í somu stund og hevur ongantíð verið sjúkur í rygginum síðani.

*Effie Campbell.*

# Eitt bønarsvar og ein áminning

Ein kona vitnaði niðri á Blákrosskaféini. „Fyri nøkrum árum síðani upplivdi eg nakað, sum eg ongantíð gloymi. Eg fór saman við einari vinkonu míni og soni hennara til Fuglafjarðar. Har skuldu vit fara at hyggja at sjónkeikinum „Emil úr Lønnebergi“. Vit fóru í góðari tíð, so vit kundu fara inn at vitja eini eldri hjún, har konan var rættiliga sjúk.

Tá ið leikurin var liðugur, skuldu vit koyra heim aftur. Hetta var í desember mánaði, og nú var tað blivið so hált sum á kalvabaki. Vegurin var glerstoyttur. Tá ið vit komu til Syðrugøtu, koyrdu vit niðan eftir tí brøttu brekkuni har, men ikki vardi leingi, til bilurin steðgaði, hann megnaði ikki brekkuna, tað var alt ov hált. Framman fyri okkum var ein annar bilur, ið eisini var uppsteðgaður.

Eg sat á baksetrinum og bað. Eg bað Jesus hjálpa okkum burtur úr hesum. Tá kemur ein bilur koyrandi ímóti okkum. Tá ið hann sær tveir uppsteðgaðar bilar, steðgar hann og kemur út. Hann fer fyrst til hin bilin og sigur okkurt. So kemur hann yvir til okkara. Eg gloymi aldri tey orðini, sum hann segði við okkum: „**Tit mugu venda um og koyra inn á tann smala vegin**!“

Hetta ljóðaði sum ein andalig áminning. Tað, sum maðurin meinti við, var, at ein annar gamal vegur var eisini her. Tað var ein smalur grúsvegur. Sonur vinkonuna spurdi, um maðurin ikki kundi koma inn í okkara bil og koyra hann, tí so kundi hann koma aftaná í bilinum hjá manninum. Jú, tað var gaman í. Maðurin bakkaði so allan vegin oman gjøgnum brekkuna og snaraði síðani inn á smala grúsvegin, og nú var eingin

trupulleiki at koma niðan á brekkuna. So var leyst og liðugt hjá okkum, tí nú gekk leiðin oman gjøgnum brekkuna, og vit komu heim í øllum góðum. Men áminningin fer mær ongantíð úr huga: „Tit mugu venda um og koyra inn á smala vegin!“

*Effie Campbell.*

# Blái Krossur í Sandnes í Noregi

Tað var eitt kvøldið, at vit sótu og hugdu at Visjon Norge. Har høvdu teir samrøðu við leiðaran á Bláa Krossi í Sandnes og við tveir av hansara medarbeiðarum.

Leiðarin, sum mundi vera síðst í 60-árunum, hevði sum ungur verið rúsmisnýtari. Hann gjørdist trúgvandi, og Harrin loysti hann burtur úr øllum vesaldóminum og gav honum kall at fara at arbeiða hjá Bláa Krossi. Men hann gloymdi ikki síni gomlu vinfólk og vitjaði ofta yvir á Plata í Oslo, sum er tað staðið, har rúsevnismisnýtarar halda til.

Ein dagin, tá ið hann var til arbeiðis á Bláa Krossi, fekk hann eina sterka sannføring frá Harranum, at hann skuldi senda einum ávísum manni eitt SMS. Leiðarin tók fartelefonina og skrivaði: Í faðirs míns húsi eru mong rúm – tú ert eisini vælkomin. So sendi hann SMS-ið. Tá ið misnýtarin fekk hesi boðini, høvdu tey so stóra ávirkan á hann, at hann í stundini reistist og fór til Sandnes at leita sær hjálp. Hann bleiv frelstur, fríaður og fór trý ár á ein bíbliuskúla, og síðani hevur hann nú í fleiri ár verið ein av medarbeiðarunum á Bláa Krossi.

*Effie Campbell.*

---

Skrivað stendur í Orðt. 11,11, at **bønirnar hjá gudsóttandi fólkum fáa býin at blóma.** So latið okkum vera trúføst í bønini fyri landi okkara og øllum býum og bygdum, so at Gud verjir okkum. Latið okkum biðja: „Leið okkum ikki í freistingar – men frels okkum frá tí illa!“

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 3. mai | Tekstur: | 1. Kong. 18, 17-39 | bíbliuorð: | 1. Kon. 18,39b |
| 10. mai | Tekstur: | Dán. 1,18-20; 3,1-30 | bíbliuorð: | 2 Mós. 20,3 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74